HB-TB 9-3 (5-1)

# HB bankaði TB

**Heili 12 mál komu í dystinum sunnudagin í Gundadali. Við sigrinum er HB nú einsamalt oddalið**

1.DEILD MENN
*Páll Holm Johannesen*

Við greiðari leikligari yvirvág allan dystin, vann HB heili 9-3 á TB sunnudagin, og er nú einsamalt í oddinum í føroysku 1. deild. Hóast HB skoraði 9 mál sunnudagin, so kundu teir skotið tað dupulta, um teir høvdu verið nærlagdari frammanfyri TB-málinum. Frá fyrsta bríksli skolaðu álopini oman ímóti TB-málinum, og tvøramenn skulu vera fegnir um, at tapið ikki gjørdist enn størri. TB vóru nógv skerdir undan dystinum, tí seks spælarar, ið spældu við seinasta vikuskiftið, vóru ikki síggja á vøllinum sunnudagin. Ein teirra var landsliðsleikarin Óli Johannesen, ið hevur skaða at dragast við.

Ikki var meir enn minutturin farin av dystinum, so lá bólturin í TB-málinum. Jón Rói Jacobsen kom eftir hornaspark at liggja væl fyri inni í TB-brotsteiginum, og kundi lættliga seta bóltin í netið til støðuna 1-0 til HB. Sjálvt um hálvleiksstøðan varð heili 5-1 til HB, so komu skuldi ganga góður hálvur tímið minuttir, áðrenn næsta málið kom. Tó so, møguleikar vóru til at økja um leiðsluna, men antin vóru HB-framherjarnir óneyvir frammanfyri málinum ella stóð TB-málverjin, Lars Muller, teimum í vegin.

### 5 mál seinasta korterið

Eftir 32 minuttir, eydnaðist tað HB aftur at fáa mál. Rangstøðufellan hjá TB miseyðnast, og Andrew av Fløtum strýkur avstað, rundar málverjan og ein verjuleikari, og leggur bóltin í tóma TB-málið. Seks minuttir seinni vóru HB´arnir aftur uppá spæl, Rúni Nolsøe og Hans á Lag kombinera væl, har bólturin verður lagdur útfrá aftur til Hans, sum langar bóltin upp í nettakið til 3-0. Eitt sera flott mál. Stutt fyri hálvleik fekk TB minka um munin, tá Kaj Roest, eftir fríspart úr vinstru, skallaði bóltin í netið. Ikki gekk rúm tíð til HB svaraði aftur, eftir ófantaligt verjuspæl, verða beinini tikin undan Andrew av Fløtum, og domarin peikar eirindaleyst á brotssparksplettin. Andrew tekur sjálvur, og setur bóltin trygt í netið. Beint fyri hálvleikssteðgin, var Jón Rói aftur upp á spæl. Hann fær ein langa sending, og lyftir bóltin uppum málverjan, og skallar síðan bóltin í málið til hálvleiksstøðuna 5-1.

### HB tók sær av løttum í seinna hálvleiki

Við hálvleiksstøðuni 5-1, var dysturin í roynd u veru avgjørdur, og tað merktist eisini í seinna hálvleiki. HB spældi við lægri blussi allan seinna hálvleik, og hóast seks mál komu aftrat, so var ferðin á spælinum ikki serliga høg. HB valdi eisini at skifta málverja í hálvleikinum, har Pól Næss Joensen fekk møguleikan. Eisini fekk dreingjaliðsspælarin, Páll Mohr Joensen, sín fyrsta dyst á 1. liði hjá HB sunnudagin, tá hann varð innskiftur í 61 minutti.

Hóast havnarmennirnir ikki løgdu líka nógv fyri í seinna hálvleiki, so vóru ikki meir enn 10 minuttir farnir til, at teir aftur fingu mál. Hans á Lag vildi ikki standa aftanfyri Jón Róa og Andrew, og við einum headara eftir fríspark, skoraði hann eisini sítt annað mál í dystinum. Løtu seinni var aftur mál, Jón Rói verður spældur ígjøgnum og skorar trygt til støðuna 7-1. Í teimum síðstu 25. minuttunum fullu fýra mál aftrat, tvey í part. Fyrst minkaði Magni Petersen um munin við brotsparki, og síðani gjørdi Andrew av Fløtum tað honum eftir, tá hann í 76. minutti skeyt sítt næsta brotsspark og triða mál í dystinum. Í yvirtíðini komu tvey mál aftrat, Pætur Dahl streyk ígjøgnum og legði HB á odda 9-2, meðan Allan Michelsen stutt fyri leiklok fekk seinasta fót á eftir ein fríspæling.

Um dystin er at siga, at stóri málmunurin sigur okkum, at her varð talan um dyst millum topp og botn, har oddaliðið úr Havn við sigrinum hevur lagt seg einsamalt á odda í føroysku landskappingini. Hjá tvøroyamonnum var hetta ein dystur, ið skjótt skal gloymast. Næsta vikuskiftið skulu teir vitja EB/Streym, har úrtøkan vónandi gert betri enn í Gundadali sunnudagin.



*Tað er ikki á hvørjum degi, at Hans á Lag skjýtur mál. Men sunnudagin fekk hann tvey, harav annað var ein sonn perla, og tað sigur kanska ikki so lítið um yvirvágina, sum HB hevði hendan dagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Dysturin í tølum:**

**HB-TB 9-3 (5-1)**
1-0 Jón Rói Jacobsen
2-0 Andrew av Fløtum
3-0 Hans á Lag
3-1 Kaj Roest
4-1 Andrew av Fløtum (br)
5-1 Jón Rói Jacobsen
6-1 Hans á Lag
7-1 Jón Rói Jacobsen
7-2 Magni Petersen (br)
8-2 Andrew av Fløtum (br)
9-2 Pætur Dahl
9-3 Allan Michelsen

Dómari: Ejler Rasmussen gjørdi ikki uppgávuna torførari enn hon var.

HB: Bárður Johannesen-Hans á Lag, Jóhannis Joensen, Jan C.Dam, Janus Joensen-Tór-Ingar Akselsen, Rúni Nolsøe, Nicu Dogaru, Pætur Dahl-Jón Rói Jacobsen, Andrew av Fløtum
TB: Lars Muller-Magni Petersen, Teitur Rasmussen, Jón Tórur Holm-Olivur Abrahamsen, Einar Petersen, Dan Mortensen, Jón Johannesen, Bárður Dimon-Kaj Roest, Allan Michelsen

## Johan Byrial skuldi vera við TB

**DBU-løggeving steðgaði landsliðsleikarinum at vera á vøllinum í Gundadali sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Nú stríðið um at sleppa undan niðurflyting harðnar, vóru tvøramenn farnir undir at leita sær styrk til komandi dystirnar. Ætlanin var, at hálvi føroyingurin, Johan Byrial Hansen, skuldi leika við TB í vikuskiftinum. Johan er sum kunnugt sáttmálabundin í superligafelagnum, OB, har hann hevur havt trupult við sær vinna sær pláss á besta liðnum. Vantandi spælitíð hevði við sær, at hann í vár varð útlæntur til 1. deildarfelagið, Fredericia.

Danska kappingin er fyri langari síðan farin í summarfrí, og tí hevði TB kannað sær møguleikan at fáa Johan Byrial at leika teir báðar síðstu dystirnar undan summarsteðginum. Avtala var eisini komin í lagi við leikaran sjálvan, men fríggjadagin kom so skriv frá DBU, ið noktaði Johan Byrial at skifta til TB. Orsøkin var, at sambært lógunum hjá DBU, hevur ein leikari ikki loyvi til spæla við trimum ymiskum feløgum uppá eitt kappingarár, og tískil bleiv avtalan av ongum.




*Andrew av Fløtum dregur fram við Lars Müller, áðrenn hann skorar til 2-0. Andrew gjørdi trý mál sunnudagin, og er nú besti málskjúttin í føroysku landskappingini*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



HB-KÍ 0-0:

# HB dugdi ikki at gera mál

**KÍ náddi málinum um at hava í minsta lagi eitt stig við sær aftur til Klaksvíkar**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað kom einki mál, tá 2. deildarliðini hjá HB og KÍ hittust í Gundadali leygardagin. HB hevði júst vunnið óvæntaðan sigur ímóti ÍF, meðan KÍ eisini hevur savnað sær nógv stig higartil. Men tað var ikki tí, at eingir møguleikar vóru at gera mál – als ikki.

KÍ kom til Havnar eftir einum stigi, og tað fingu teir eisini við sær norðuraftur, men tað leikaði hart á, áðrenn dómarin brískladi dystin av.

HB álopið við Gunnari Mohr og Eyðuni Samuelsen hevði fleiri góðar møguleikar at gera mál. Longu í fyrra hálvleiki hevði Eyðun tveir opnar møguleikar, men tvørstongin stóð í vegin. Besti møguleikin hjá KÍ í fyrra hálvleiki var tá Gunnleiv Biskopstøð varð spældur leysur í høgra borði, men skotið fór fram við málinum hjá Kaj Leo Johannesen.

KÍ hevði nógv fólk aftanfyri bóltin, vardi á egnari hálvu og dúvaði síðani upp á mótálop. HB hevði stóran part av spælinum, teir brutu stundum ígjøgnum í síðunum, og eisini bóltar mitt fram eftir vøllinum skaptu vandastøður.

### Brotsspark í seinastu løtu

Í seinna hálvleiki var gongdin tann sama. HB kom til nógvar kjansir, og onkrir teirra vóru stórir. Enn einaferð vóru tað álopsspælararnir, sum ferð eftir ferð komu í góðar støður, men eingin bóltur fór fram við John Williami Joensen, sum var ein brandur í málinum. Ofta var tað lætt hjá honum at verja fyri, men tað vóru eisini nakrar støðu, har John William bjargaði sera væl.

Størsta møguleikan fekk HB stutt fyri leiklok, tá KÍ verjuspælari kom at gera eitt heldur klossut brotsspark. Heldur ikki hesaferð eydnaðist HB at skora, tí HB-spælarin sendi á tvørstongina og út í spælið.

Og so var um reppið at KÍ stjól øll trý stigini, tí í seinastu løtu høvdu teir sín størsta kjans eftir gott álop í høgru. Inni við málið stóð Gunnleiv Biskopstø púra leysur, men hann skjeyt beint á Kaj Leo í HB málinum.

Tað hevði verið beint ímóti býti av kjansum og spæli, um KÍ hevði vunnið dystin, tí HB vildi meira hendan dystin. KÍ fekk tó eina stigið við sær, og tað vóru klaksvíkingar, sum ikki høvdu allar sínar vanligu menn við, væl nøgdir við.



*Hallur Danielsen var leygardagin partur av 2. deildarliðnum hjá HB, men hann var ikki stórt frægari enn liðfelagarnir, tá tað ráddi um at gera mál*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Dysturin í tølum**
HB-KÍ 0-0

GÍ-EB/Streymur 3-0 (3-0):

# GÍ hevði eina rúgvu av møguleikum

**Men í 2. hálvleiki, tá EB/Streymur var væl við í spælinum, fingu teir einki mál, m. a. tí teir sjálvir bjargaðu á mállinjuni!**

GÍ–EB/STREYMUR
*Jóannes Hansen*

GÍ vann sunnudagin tey trý stigini á heimavølli ímóti EB/Streymi. Hóast EB/Streymur onkuntíð hevur spælt GÍ eitt puss, og hóast EB/Streymur næstsíðsta vikuskifti á heimavølli vann ímóti HB, so hevði tað verið púra óvæntað, um GÍ ikki hevði vunnið á heimavølli ímóti EB/Streymi.

Gøtumenn fegnaðust um stigini, og lagið var serliga gott, tí nú tykist tað lýsna. Leikligu avrikini hava ikki altíð verið so góð, men nú sær tað hampuliga væl út við fólki, og so sást tað so skjótt aftur í spælinum. Popczynski, sum hevur verið skaddur alt árið, er so smátt farin at venja aftur, og teir rokna við, at hann kanska verður í hópinum komandi sunnudag.

Hesa ferð vóru Magni Jarnskor og Gidek leikbannaðir. Tað átti at havt verið stórur saknur á miðvøllinum, og tað var tað eisini. Men Sámal Joensen hevði hesa ferð góðan stuðul í Henningi Jarnskor, sum í ikki heilt somu útgávu sum áður, var hollur í vinstru. Áslakur R. Petersen var betri mitt fyri, enn hann ofta hevur verið í borðinum, Hans Pauli Petersen var sera framrættaður í høgru, og Magnus Skoralíð og serliga Súni Olsen vóru væl upplagdir, tá teir stuðlaðu Súna Fríða Johannesen, sum var einsamallur á toppinum. Súni Fríði hevði onrka góða roynd ímóti málinum, men tað eydnaðist honum heldur ikki hesa ferð at skora.

EB/Streymur dumpaði avgjørt ikki. Í 1. hálvleiki høvdu teir ikki so nógv at siga, men eftir steðgin vístu teir ofta gott spæl. Teir settu ikki Hall Hansen í málinum og Leiv Hansen og Bartal Eliasen í miðverjuni hjá GÍ upp á tær heilt stóru royndirnar, men miðvallarspælið – eitt tvey, yvirlapp og diagonal skift – vóru ofta í lagi.

Sjálvandi var tað ein dyggur smeitur hjá EB/Streymi, tá Sorin Anghel noyddist at fara av vøllinum, tí hann var skaðaplágaður. Men tað var serliga hugaligt at staðfesta, at EB/Streymur – við manning úr Kollafirði og norður til Eiðis og báðu megin Sundalagið – í 2. hálvleiki megnaði at vera so væl við, sum teir vóru.

### Málini

Tá ein hálvur tími var farin, var spurningurin um, hvør fór at fáa stigini, avgjørdur. Henning Jarnskor átti næstsíðsta fótin á fyrsta málinum. Hann legði inn fyri úr vinstru, og systursonurin, Súni Olsen, setti krúllin undir bóltin. Tá var eitt stórt korter farið.

Seks minuttir seinni var tað høvdið á Bartali Elisen, sum var næstsíðsta stationin. Súni Olsen legði horna innfyri úr vinstru, og miðverjin og toppskjúttin hjá GÍ hevði allan yvirkroppin omanfyri alla hina rúgvuna í brotsteiginum, tá hann drønstútaði í málið.

Síðsta málið var ivaleyst tað vakrasta, og aftur vóru tað Henning Jarnskor og Súni Olsen, sum vóru høvuðsleikarar. Henning sendi diagonalt úr vinstru til Súna Olsen, sum – uttan at missa ferðina – tamdi bóltin í rennikósina, sneiddi framvið einum ella tveimum, og setti framvið Gunnari á Steig.

Fagnaðurin var stórur í Serpigerði, og tað var lagt upp til stórsigur, men tað komu ikki fleiri mál. At tey ikki komu átti Gunnar á Steig í EB/Streyma málinum sín stóra lut í. Hann var sum ein køttur á strikuni, og hann var tryggur, tá hann fór út í brotsteigin eftir luftbóltunum. Fleiri ferðir í 2. hálvleiki vóru tað undir hálvtakinum farin at fegnast um 4–0 málið, men tað kom ongantíð. Poul Ennigarð og Bartal Eliasen stútaðu eftir horna, og skotriðurnar stóðu um oyruni á gestunum, men tað segði tað sama. Ta einu ferðina fingu gøtumenn bóltin inn um allar mótstøðumenninar. Men tá stóð ein gulur inni á strikuni, og bólturin kom á hann!



*Hóast hann einki mál fekk hesaferð, so tykist Súni Fríði Johannesen nú vera um at koma fyri seg, og tað er avgjørt ein av frágreðingunum um, hví GÍ nú tykist ganga framá*

*Mynd: Samson Nesá*

**Dysturin í tølum**

**GÍ-EB/Streymur 3-0 (0-0)**
1-0: Súni Olsen, 18
2-0: Bartal Eliasen, 24
3-0: Súni Olsen, 30

GÍ: Hallur Hansen – Bartal Eliasen, Poul Ennigarð, Leivur Hansen – Hans Pauli Petersen, Súni Olsen, Áslakur R. Petersen, Sámal Joensen, Magnus Skoralíð, Henning Jarnskor – Súni Fríði Johannesen
EB/Streymur: Gunnar á Steig – Hallur Jacobsen, Knút Vesturtún, Alfred Jacobsen, Christian Carlsson – Jákup Martin Joensen, Ronnie Midjord, Teitur Joensen, Hans Pauli Samuelsen – Vinjard Dam, Sorin Anghel